# Brandur á video og tónleikur í myndum

**»The Way I Am« er heitið á nýggja sjónbandinum, sum júst er komið í sølubúðirnar. Sjónbandið snýr seg um ungu sangstjørnuna, Brand Enni. Eisini er ein nýggj tónleikaárbók komin á marknaðin. Hetta er onnur bókin av hesum slagnum. Studio Pegasus í Klaksvík stendur fyri báðum útgávunum**

ÚTGÁVUR
*Ingrid Bjarnastein*



*Frá vinstru: Eyðfinn Jensen, Brandur Enni, Eyðun Klakstein og Steintór Rasmussen*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Allir fjeppararnir hjá Brandi Enni kunnu nú gleðast. Nú er eitt nýtt sjónband við heitinum »The Way I Am« er nú komið í sølubúðirnar.

– Sjónbandið er 40 minuttir til longdar, har Brandur sjálvur fortelur søguna um tað, sum er hent seinasta árið, sigur Steintór Rasmussen, manageri hjá Brandi.

Tað er Eyðfinn Jensen, sum er høvuðsmyndamaður, og er tað eisini hann, sum hevur redigerað allar upptøkurnar.

– Ein kann kalla hetta eitt status av, hvussu langt Brandur er komin higartil, greiðir Steintór víðari frá. – Sjálvt heitið á sjónbandinum er ein sangur, sum Brandur sjálvur hevur skrivað. Hetta er ein nýggjur sangur, sum ongantíð er útgivin fyrr, og sjónbandið byrjar eisini við hesum sanginum.

Filmurin um ungu føroysku poppstjørnuna tekur hyggjaran við á eina ferð, har hann sleppur við á konsertir, til Danmarkar, har Brandur er gestur hjá Bubber, handan leiktjøldini tá sjónbandalagið til Waiting in the Moonlight varð tikið upp og so framvegis.

Lítil ivi man vera í, at hesin filmurin fer at liggja undir nógvum jólatrøum í ár.

### Nýtt plátufelag

Í kjalarvørrinum av eini størri verkætlan um at geva Brand út í bæði Íslandi og Danmark fyrst í komandi ári, verður eisini nýtt plátufelag stovnað. Talan er um NAME, sum stendur fyri North Atlantic Music Enterprize.

Fyrst í næsta árið verður Waiting in the Moonligt givin út sum stakfløga í Danmark, og í februar verður Brandur á eini stórari konsert yviri í Íslandi. Í hesum sambandi verður eisini ein nýggj pláta givin út, har ein duett við Brandi og íslendsku Jóhonnu Gúðrun eisini er við.

– Málið í løtuni er at røkka útlendska marknaðinum. Vit savna okkum um Danmark og Ísland í fyrsta umfari, men áhugin uttanfyri hesi londini er eisini til staðar. Men tað er nógv frá einum áhugaðum brævi til veruleika, sigur Steintór.

### Tónleikaárbókin

Á tíðindafundi hósdagin var nýggja tónleikaárbókin eisini løgd fram. Tónleikaárbókin er ein lýsing av tónleikalívinum í Føroyum seinasta árið í orðum og myndum.

– Har eru fleiri nýggjar greinar, og nógvar myndir, sum ongantíð hava verið at sæð áður, sigur Eyðun Klakstein, sum hevur redigerað bókina.

Bókin er bygd á tilfar, sum hevur staðið í Sosialinum og á pop.fo seinasta árið, umframt tær nýggju greinarnar. Alt tilfarið er skrivað og redigerað av nýggjum.

– Ótrúliga nógv gongur fyri seg í føroyska tónleikaheiminum, og seinasta árið hevur verið ótrúliga merkt av, at føroyskir bólkar hava verið uttanlands og gjørt um seg, greiðir Eyðun frá.

– Tónleikabókin er ein tíðarmynd av føroyskum tónleiki, og ætlanin er at gera hana til ein fastan tátt.

Fyrstu ferð tónleikaárbókin kom út var í fjør. Tá vóru tað Sosialurin og Studio Pegasus, sum góvu bókina út í felag, men í ár er tað bara Studio Pegasus, sum stendur fyri útgávuni. Seinnapartin hósdagin varð skipað fyri tónleikacafé á Platform. Her var høvi at ogna sær nýggju tónleikaárbókina og nýggja filmin um Brand.

Nakað av fólki var komið saman, har møguleiki var fyri at fáa eitt signerað eintak av teimum báðum nýggju útgávunum, og har Brandur saman við øðrum tónleikarum bæði sang og spældi.



*Filmurin um Brand er 40 minuttir til longdar. Ilt er at spáa um, hvussu nógvum jólatrøum hann fer at liggja undir í ár*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Fimm listarmenn sýna fram

**Í dag letur seinasta framsýningin í Listaskálanum í ár upp. Hetta er somuleiðis eisini seinasta framsýningin, meðan Bárður Jákupsson er leiðari. Tað eru Amariel Norðoy, Kári Svensson, Eyðun av Reyni, Anker Mortensen og Andreas Andreasen, sum sýna fram**

LISTAFRAMSÝNING
*Ingrid Bjarnastein*

Klokkan 16 í dag letur seinasta framsýningin í Listaskálanum í ár upp. Listarmenninir eru fimm í tali, og fimm av teimum væl kendu. Talan er um Amariel Norðoy, Kára Svennson, Eyðun av Reyni, Anker Mortensen og Andreas Andreasen.

Samstundis sum hetta er seinasta listaframsýningin í ár, er hetta seinasta sýningin, meðan Bárður Jákupsson er leiðari. Hann fer nevniliga frá 1. januar.

Eini 90 verk verða at síggja í Listaskálanum í døgunum 7. – 15. desember. Talan er um skulpturar og málningar.

Opið er í Listaskálanum týsdag til fríggjadag frá 14 – 17 og leygardag og sunnudag frá 14 – 18.

Tað eru Amariel Norðoy, Kári Svensson og Eyðun av Reyni, sum í felag hava staðið fyri listaframsýningini.



*Amariel Norðoy, Kári Svensson, Eyðun av Reyni og Anker Mortensen. Hesir fýra saman við Andrias Andreasen, myndahøggara, sum vantar á myndini, sýna fram í Listaskálanum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*



# Kirkjan neyvan yvirtikin í bræði

**Stendur tað til Kára P. Højgaard úr Sjálvstýrisflokkinum, verða allir partar hoyrdir og alt fingið upp á pláss, áðrenn fólkakirkjan verður yvirtikin. Tað verður neyvan fyrsta dagin, tí sambært bispi liggur nógv arbeiði og bíðar, áðrenn kirkjan er klar til yvirtøku**

FÓLKAKIRKJAN
*Ingi Rasmussen*



Heimaarbeiðið er ikki gjørt liðugt enn, og tí kemur tað ikki upp á tal at yvirtaka kirkjuna enn.

So avgjørdur er Kári P. Højgaard, løgtingsmaður fyri Sjálvstýrisflokkin. Sostatt skýtir hann hol í ætlanina um eina skjóta yvirtøku av fólkakirkjuni, sum tykist at vera beint undir landi.

Embætissamráðingarnar eru lidnar, og ongar danskar forðingar eru fyri at yvirtaka kirkjuna. Nú er tað upp til føroyingar at gera seg klárar, og tann politiska viðgerðin av málinum er farin í gongd í samgonguni.

Men Kári P. Højgaard, sum er avgerandi 17. løgtingsmaðurin hjá samgonguni, er so mikið ónøgdur við gongdina í málinum higartil, at yvirtøkan kann verða skotin eitt fitt petti út í framtíðina.

Formliga verður kirkjan yvirtikin við, at ein yvirtøkulóg verður løgd fyri tingið til samtyktar.

– Vit atkvøða ikki fyri einari yvirtøku, fyrr enn allar fortreytirnar eru fingnar upp á pláss, og tað eru tær langt frá komnar enn, sigur Kári P. Højgaard.

### Ongin dato

Kári P. Højgaard sigur seg annars verða sinnaðan at yvirtaka kirkjuna. Hann vísir til samgonguskjalið. Har stendur, at fólkakirkjan skal yvirtakast í samstarvi við allar partar í kirkjuni, so hon kann halda fram í verandi bygnaði, og meirútreiðslur í sambandi við yvirtøku verða goldnar av landskassanum. Talan er um einar 14 milliónir krónur.

– Eg haldi, at allir partar eru positivir, um teir verða hoyrdir. Bæði politikisku flokkarnir, kirkjufólkið og kirkjumyndugleikarnir, prestar og bispur tykjast sinnaðir at yvirtaka kirkjuna, um rætt verður atborið. Bispur, dómpróvstur og prestar eiga at vera við í at leggja yvirtøkuna til rættis, men tann parturin av heimaarbeiðnum er ikki als gjørdur enn, og tí dugi eg ikki at síggja, at vit kunnu seta nakran sum helst dato á eina yvirtøku, sigur Kári P. Højgaard.

### Alt greitt áðrenn

Einsamalli sjálvstýristingmaðurin í løgtinginum undirstrikar, at skal eitt yvirtøkuuppskot fáa hansara avgerandi atkvøðu í tinginum, so skal tað vera fyri einari kirkju, ið líkist henni, vit kenna í dag.

– Tað skal vera greitt áðrenn, hvussu framtíðin hjá kirkjuni sær út. Tað skal ikki avgerast seinni. Talan skal vera um eina fólkakirkju, sum verður fíggjað úr landskassanum. Og t.d. sambandið við donsku grundlógina skal verða heilt greitt, tí vit fáa neyvan okkara egnu grundlóg fyribils, sigur Kári P. Højgaard.

Hann skjýtir upp, at ein arbeiðsbólkur við umboðum fyri allar partar í kirkjuni verður gjørdur, sum kann seta síni krøv til eina yvirtøku.

### Troyttur bispur

Fær sjálvstýristingmaðurin sín vilja kann tað ganga lang tíð, áðrenn kirkjan verður yvirtikin. Tí sambært bispi liggur nógv á láni, sum skal gerast, áðrenn kirkjan er klár at koma á føroyskar hendur.

– Tað er kanska nakað nógv at forlanga, at vit vera tikin uppí aftur nú, tí tað tekur tíð at gera tað arbeiði, sum vit hava skotið upp. Vit vildu havt allar kirkjulógirnar upp á pláss fyrst, men tað arbeiðið bleiv steðgað í 1998, sigur Hans Jacob Joensen bispur.

Skuldi tað arbeiðið verið gjørt, hevði tað helst tikið ár heldur enn mánaðir, metur bispur, sum sigur seg vera troyttan av hesum kjakinum.

– Vilja politikararnir yvirtaka kirkjuna, áðrenn alt er klárt, so teir um tað. Vit vildu tað øðrvísi, men vóru steðgað og eru ongantíð komin í gongd aftur. Sostatt eru fimm ár spilt burtur, har vit kundu fingið nógv á skaftið, sigur Hans Jacob Joensen.

Prestar og bispur hava í felag bjóðað seg fram at samstarva um at yvirtaka kirkjuna. Men teir hava onki svar fingið.

**Fakta**

### Samgonguskjalið um yvirtøkuna av fólkakirkjuni:

- Fólkakirkjan verður í samstarvi við allar partar í føroysku kirkjuni yvirtikin, so hon kann halda fram í verandi bygnaði, og meirútreiðslur í sambandi við yvirtøku verða goldnar av landskassanum.
- Allar yvirtøkur verða neyvt fyrireikaðar í samskifti við allar avvarðandi partar og neyvar umsitingar- og fíggjarætlanir gjørdar og lagdar fyri Løgtingið, áðrenn yvirtøkan verður framd.

# Kirkjuyvirtøka er undir landi

**Embætisfólk í føroyska mentamálaráðnum og danska kirkjumálaráðnum vænta, at ein yvirtøka av kirkjuni í Føroyum er beint undir landi. Men Annlis Bjarkhamar avsannar, at hon kemur upp á land fyrsta dagin og sigur, at drúgv politisk viðgerð er eftir í Føroyum**

FÓLKAKIRKJAN
*Ingi Rasmussen*

Líkt er til, at tað bara er ein avgreiðsluspurningur at yvirtaka fólkakirkjuna. Samráðingarnar á embætismannastigi er lidnar, og Sosialurin skilir, at ætlanin var at hava ein fund longu um miðjan desember, har ein endalig avtala um yvirtøkudagin skuldi fáast í lag.

Ongar forðingar eru frá danskari síðu, og nú stendur tað til føroyingar at fáa síðstu viðurskiftini upp á pláss.

Kristeligt Dagblad skrivar fríggjadagin 6. desember, at kirkjumálaráðharrin Tove Fergo kemur til Føroya 16. desember at undirskriva yvirtøkuna, og endaliga avtalan verður staðfest við undirskriftini hjá Annlis Bjarkhamar landsstýriskvinnu.

### Annlis avsannar

Sjálv vísir Annlis Bjarkhamar hesum tíðindum aftur og sigur seg onki kenna til, at kirkjumálaráðharrin longu hevur bílagt ferðaseðilin til Føroya.

– Tað kann eg avsanna. Hatta má byggja á okkurt mistak. Samráðingarnar eru endaðar á embætisstigi, og úrslitið frá teimum er til viðgerðar í løgmálaráðnum í løtuni. Síðan skulu vit arbeiða við at gera ein politiska afturmelding, og sostatt verður ongin endalig avtala gjørd enn, tí vit eru ikki klár at skriva undir, sigur Annlis Bjarkhamar.

Landsstýriskvinnan leggur afturat, at hon væntar eina drúgva viðgerð í samgonguni, áðrenn nøkur yvirtøka verður klár at undirskriva. Málið hevur verið fyri á landsstýrisfundi einaferð, men tað er nústaðni nú, at tann politiski parturin skal fáast upp á pláss.

### Bispur váttar

Hvussu er og ikki. Kristeligt Dagblad hevur fingið bæði Petur Petersen aðalstjóra og stjóran í kirkjumálaráðnum Finn Langager Larsen at vátta, at yvirtøkan av fólkakirkjuni nú verður framd aftaná samráðingar í eitt ár.

Petur Petersen vil ikki úttala seg meira nágreiniligt, tí føroyingar ikki eru samdir um yvirtøkudag, kirkjuskatt og tænastuviðurskifti í kirkjuni.

Hans Jákup Joensen bispur váttar somuleiðis fyri Sosialinum, at honum kunnugt skuldi Tove Fergo koma til landið og ein sáttmáli undirskrivast 16. desember, men at tað er útskotið fyribils.